

# Eingin kúlubøka til Grønlands

Altjóða hvalaveiðinevndin IWC, heldur í hesum døgum 61. ársfundin í Portugal. Heldur ikki hesaferð varð nøkur endalig avgerð tikin á ársfundinum um uppskotið hjá Grønlandi um eina nýggja kvota á 10 kúlubøkum. Malið verður tikið upp aftur á einum eykafundi seinni í ár. Hóast greiðu niðurstøðuna hjá IWC vísindanevndini um at ein kvota á 10 kúlubøkum í Vestur Grønlandi er innan fyri burðardyggar karmar, var ikki nóg stór undirtøka fyri, at kvotan kundi verða samtykt. Sama uppskotið varð avvíst við atkvøðugreiðslu í 2008. Ein slík avgerð í IWC krevur ein 3/4 meiriluta. Felags støðan hjá ES í IWC er høvuðsforðingin fyri, at ein nýggj kvota fyri Grønland verður samtykt. Ein meiriluti av teimum 23 ES limalondum, sum eru limir í IWC er ímóti at lata Grønlandi 10 kúlubøkur. Hóast ósemju innanhýsis millum ES limalondini, har serliga Svøríki, Finnland og Estland taka undir við eini nýggjari kvotu til Grønlands, eru øll ES limalondini bundin av at atkvøða eins og meirilutin. Danmark hevur tikið fyrivarni fyri felagsstøðuni hjá ES í IWC, og tekur støðu til einstøk mál við atliti at áhugamálum hjá Grønlandi og Føroyum. Umboð fyri Føroyar tók lut á ársfundinum.




*Harrier Explorer, sum nú skjýtur seismikk fyri StatoilHydro á føroyska landgrunninum.*

# StatoilHydro farið undir umfatandi seismikk á landgrunninum

**Norksa oljufelagið StatoilHydro er farið undir eina umfatandi seismiska kanning á føroyska landgrunninum, sum skal vera grundarlagið undir eini komandi boring**

OLJULEITING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Norska oljufelagið StatoilHydro er tað oljufelagið, sum hevur flest leitiloyvi á føroyska landgrunninum. Felagið hevur verið við í øllum teimum trimum útbjóðingunum, sum hava verið við Føroyar. Eitt er at fáa tillutað leitiloyvi, annað er at skula gera tær kanningar, sum hevur loyvi krevja. StatoilHydro gjørdi í fjør fleiri kanningars við seismikkskipi á "gomlum" loyvum. Nú verður so sett út í kortið av nýggjum – í nýggjastu loyvunum.

Sosialurin skilur, at felagið av álvara fyrireikar seg til eina komandi oljuboring, sum helst verður í einum av loyvunum í 2010, 2011 ella 2012.

Í hesum sambandi hevur StatoilHydro sett út í kortið sera umfatandi seismiska kanningar í fleiri av sínum leitiloyvum, her serstakliga loyvi 16, sum felagið fekk tillutað í 3. útbjóðing saman við Dong og so teimum báðum føroysku oljufeløgunum Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum. Seismikkskipið Harrier Explorer er júst byrjað at skjóta seismikk. Hetta er eitt umfatandi arbeiði, tí loyvi 16 fevnir um eitt sera stórt øki. Umframt tað verður eisini farið inn á bretskt øki, og eitt sindur inn á loyvi 10 og loyvi 11 eisini.

Rúni Hansen, stjóri í StatoilHydro í Føroyum sigur, at teir skulu brúka seismikkin til at finna fram til, hvar teir skulu bora ein møguligan brunn komandi árini. Arbeiðið hjá seismikkskipinum fer at taka umleið hálvan annan mánað.

Lesið eisini samrøðu við forsetan hjá StatoilHydro fyri altjóða leiting, Tim Dodson í Vinnuni í Sosialinum í morgin. Sosialurin hevur júst vitjað í London, har blaðið hitti Statoilstjóran.




*Talan er um eina rættiliga umfatandi kanning, har seismikkur verður skotin á einum stórum øki*